# Handilsvirkið Niclasen 145 ár




*Handilsvirkið Niclasen í Sørvági er ein av elstu fyritøkum í landinum*

Í dag 29. desember eru 145 ár síðan handilsvirkið Niclasen í Sørvági byrjaði sum ein úthandil hjá Jóhan Mortensen á Tvøroyri.

Í 1856 var einahandilin avtikin í Føroyum, tá sluppu føroyingar sjálvir at hava handil. Sama ár byrjaði Jóhan Mortensen handil sín á Tvøroyri. Jóhan var virkin maður, og í árunum eftir komu fleiri úthandlar kring landið. Ein av hesum úthandlum kom at vera í bóndahúsunum hjá Niclas Samuelsen í Sørvági, nevnd Norðstova.

Hesin úthandil varð stovnaður í 1864, og handlaði mest við matvørum, byggitilfari og ymiskum neyðsynjarvørum at byrja við. Niclas fekk fyrsta handilsloyvi í familjuni tann 29. desember hetta árið.

Niclas Samuelsen var um tað mundið komin væl til árs, og longu í 1872 tók sonur hansara, Dánjal Niclasen (Ríki-Dánjal), ið tá var 31 ára gamal, við. Niclas doyði í 1896. Dánjal helt á til ár 1900, tá hansara dagar vóru taldir og árarnar lagdar inn. Tá tók sonurin Niclas Niclasen við.

Eftir aldarskiftið gjørdist virksemið hjá fyritøkuni størri, og í 1916 kom posthús eisini í Norðstovu. Postflutningurin til Bø, Gásadals og Mykinesar var eisini røkt av felagnum.

Frá 1905 og fram til 1925 keypti fyritøkan sjey smærri 6-10 tons dekksbátar, og fiskurin varð virkaður í Sørvági. Hildið var fram við hesum fiskiskapi til fyrst í 30-árunum, tá felagið byrjaði at keypa sluppir.

Samstarvið við Mortensen helt fram til eftir fyrsta veraldarbardaga, tá Handilsvirkið Niclasen byrjaði at innflyta sjálvir.

Í 1939 varð Dánjal Niclasen settur sum stjóri í fyritøkuni. Meðan seinni heimsbardagi herjaði, varð einki nýtt skip keypt, men beint eftir kríggið komu teir tríggir snurruvoddarnir: Vesturleið, Vestursøki og Vesturleiki, og í 1947 kom Vesturskin, ið var trolari. Best kendur av hesum bátum er ivaleyst Vesturleið, sum felagið setti inn í ferðafólka- og farmasigling millum Miðvág og Havnina. Handilsvirkið Niclasen hevði eisini siglingina til Mykinesar.

Eftir kríggið komu fleiri 30-tons bátar til bygdina, og onkrar av hesum átti Niclasen upprunaliga, meðan teir uppkeyptu aðrar. Hetta var so mikið trygt rávørugrundarlag, at Niclasen í 1954 settu á stovn eitt flakavirki. Hetta var fyrsta flakavirkið í landinum. Dánjal Niclasen var stjóri, meðan virkisleiðarin fyrstu fýra árini var Brynjálvur Mortensen, langabbasonur gamla Jóhan Mortensen, sum stovnaði Mortensenshandilin á Tvøroyri. So á ein hátt rann saman aftur millum fyritøkurnar.

Tá Dánjal Niclasen andaðist í 1971, tók Niclas Niclasen við starvinum sum stjóri í fyritøkuni og í 1992 tók Jørgen Niclasen við sum stjóri.

Eins og í byrjanini fyri 145 árum síðan, er tað handil, sum fyrtøkan fæst við í dag við eini timburdeild við m.a. timburi, máling og stoypitilfari og eina byggibúð við amboðum, búnýti, prýðislutum, báta- og navationsútgerð eins og ymiskum til urtagarðin.

Í dag er Edward Niclasen stjóri og Birgir av Vollanum dagligur leiðari í Handilsvirkinum Niclasen.

*-red*



*Norðstovuhandilin sum hann upprunaliga sá út*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## MERKISDAGAR

**Gullbrúdleyp**
12. jan. hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. hava Guðny Krossteig Mortensen og Eyðfinnur Mortensen, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fyri innbornum á Hotel Føroyum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda vit silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum í Klaksvík frá kl. 16. Julianna og Olivur Thomsen.

**70 ára føðingardagur**
Erhard Mortensen 70 ár. Vælkomin í føðingardag! Hósdagin 31. desember fylli eg 70 ár. Føðingardagurin verður hildin í Posthúskjallaranum í Tórsgøtu millum klokkan 11-17, og eru øll hjartaliga vælkomin. Eg gleði meg at síggja tykkum.

**80 ára føðingardagur**
30. des. verður Asta Larsen Tvøroyri 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 3. jan. verður Steingrim Joensen, Argjaboðagøta 32, Argir, 85 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum við fótbóltsvøllin á Argjum sunnudagin 3. jan frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.